# Skal tryggja eitt reint umhvørvi og eina reina natúru

*Nú er fyrsta stigið tikið til at orða ein føroyskan umhvørvispolitikk*

Áki Bertholdsen

Nú er fyrsta stigið tikið til at orða ein føroyskan umhvørvispolitikk.

Tað er Eyðun Elttør, landsstýrismaður í umhvørvismálum, sum hevur sett ein arbeiðsbólk, sum skal gera eina frágreiðing um føroyska natúru og umhvørvið í Føroyum.

Frágreiðingin hjá arbeiðsbólkinum skal verða grundarlagið undir einum aðalorðaskifti í løgtinginum um umhvørvismál. Aðalorðaskiftið skal verða, áðrenn næstu Ólavsøku.

Aftaná tað orðaskiftið, verður farið undir at orða ein ítøkiligan, føroyskan umhvørvispolitikk og at gera broytingar í umhvørvislógini.

Arbeiðsbólkurin fer til verka beint aftaná summarfrítíðina og frágreiðingin skal vera liðug tíðliga í komandi ári.

Limirnir í arbeiðsbólkinum eru: Jacob Pauli Joensen á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum er formaður, Dorete Bloch frá Yvirfriðingarnevndini, Kate Sanderson á Løgmansskrivstovuni, Jógvan K. Mørkøre, formaður í Føroya Kommunufelag og Poul Andrias Joensen frá Kommunusamskipan Føroya.

Skrivari hjá arbeiðsbólkinum er Rókur Tummasarson, fulltrúi í Oljumálastýrinum.

Arbeiðssetningurin hjá bólkinum er at lýsa støðuna á umhvørvis- og natúruverndarøkinum. Hetta skal gerast við støði í umsitingini sum er, og í galdandi lóggávu.

Somuleiðis skal arbeiðsbólkurin viðgera og vísa á, hvør tørvur er á broytingum á hesum øki.

Og í triðja lagi skal bólkurin seta fram hugskot um, hvørjar loysnir kunnu nýtast til at fremja tær tilmæltu broytingarnar í verki.

Landsstýrismaðurin í umhvørvismálum sigur, at í arbeiði sínum skal bólkurin leggja dent á, at greina marknaøki og umskaringar innan lóggávuna, sum viðvíkur umhvørvis- og natúruvernd í breiðari merking.

Somuleiðis skal dentur leggjast á at lýsa altjóða rákið á økinum og støðu Føroya.

Og at enda skal abeiðsbólkurin leggja dent á at finna loysnir, sum í minst møguligan mun økja um umsitingina á økinum, men sum kortini í mest møguligan mun tryggja eitt reint umhvørvi og varðveitslu av eini fjølbroyttari natúru, sigur Oljumálastýrið.



*Nú skulu Føroyar hava ein ítøkiligan umhvørvispolitikk. Eyðun Elttør, landsstýrismaður í umhvørvismálum, hevur tikið fyrsta stigið, sum er at seta ein arbeiðsbólk at lýsa støðuna og at gera tilmæli*

# Politistarnir í Føroyum ivasamir um framtíðina

*Politistarnir hava havt fund við landsstýrismannin í fullveldismálum um framtíðina*



*Politistar eru ivasamir um, hvussu viðurskifti teirra fara at verða, um løgreglan verður yvirtikin*

Áki Bertholdsen

Í sambandi við fullveldisætlanina hjá landsstýrinum hevur spurningurin um løgregluna í Føroyum verið eitt av teimum eymu málunum, sum greiða skal fáast á.

Ikki minst hava politistarnir sjálvir verið ótryggir um framtíðina.

Verður fullveldisætlanin framd í verki verður løgreglan sjálvandi yvirtikin, sum alt annað og nógvir politistar hava spurt seg sjálvar, hvussu tað fer at ávirka teirra arbeiðsumstøður, lønarviðurskifti, pensjónir o.s.fr.

Hendan óvissan gjørdi, at Føroya Politistafelag fyri stuttum bað Høgna Hoydal, landsstýrismann í fullveldismálum um ein kunnandi fund, har teir kundu fáa nakrar spurningar svaraðar.

Høgni Hoydal sigur, at hetta var ein rættiliga positivur fundur.

Í fyrstu atløgu kundi Høgni Hoydal vissa politistarnar um, at tað er ongin ætlan at skerja løgregluna í einum sjálvstøðugum Føroyum.

– Eg fekk eisini fortalt teimum, at pensjónir, lønir og onnur viðurskifti, vóru eisini skyldur, sum føroyski staturin fór at yvirtaka, eins og tað, sum er hent við lærarum, postmonnum o.sfr., tá ið málsøkini vórðu yvirtikin.

– Í samráðingunum við danir hava vit roynt at fáa samstarv í lag ímillum føroyskr og danskar stovnar, eitt nú ímillum eina føroyska løgreglu og danska lógmálaráðið, men tað hevur danska stjórnin víst aftur.

Høgni Hoydal sigur, at ístaðin fyri at skerja løgregluna, verður heldur neyðugt at byggja hana út og at menna hana, tí í einum sjálvstøðugum Føroyum fær løgreglan heldur fleiri málsøki at røkja.

Tí heldur Høgni Hoydal, at tað átti at verðið meiri áhugavert at vera løgreglumaður í einum sjálvstøðugum Føroyum.

– Tí kann ein føroysk løgregla fáa stóran týdning. Eitt nú verður tað tá soleiðis, at føroyska løgreglan og føroysku politikarar sjálvir fáa ábyrgdina av einum máli, sum t.d. Paul Watson, fyri at nevna eitt aktuelt dømi.

Høgni Hoydal vísir m.a. á, at sum er, kostar løgreglan í Føroyum einar 42 milliónir um árið, men í Hvítu Bók er roknað við, at føroyska løgreglan fer at kosta 63 milliónir.

Og hann heldur, at tað hevur stóran týdning at menna løgregluna. Tí í einum sjálvstøðugum Føroyum hevur tað alstóran týdning, at vit hava eina løgreglu, sum er før fyri at tryggja okkum, og okkara frannalondum, at vit ikki blíva ein kriminellur fríståður við t.d. hvíttvasking av peningi, og at vit hava eftirlit við okkara mørkum.

### Skiljast sundur

Høgni Hoydal leggur eisini dent á, at í eini sjálvstøðugari føroyskari løgreglu, verður ákæruvaldið og løgreglan hvør sín stovnur.

– Í løtuni er tað sami stovnur, men formliga verður tað hildið at verða skilagott at skilja tað sundur.

Høgni Hoydal vil ikki siga, at hendan samanblandingin uppá nakran máta hevur verið ein trupulleiki fyri rættartrygdina. Men hann heldur kortini, at tað hevur týdning fyri tey, sum eru í rættarskipanini, at tað eru tveir stovnar, sum eru óheftir av hvørjum øðrum, sum arbeiða við teirra málum.

– Ákærumyndugleikin og løgreglan eru eisini tveir ymsir stovnar, sum eiga at menna sína serfrøði, hvør á sínum øki, púra leysir av hvørjum øðrum.

# Gjørdi landgongd



*Síðstu nátt gjørdi ein einsamallur grindahvalur landgongd á sandinum í Sandvík. Menn, sum fóru av bygdini tíðliga um morgunin varnaðist hann og søgdu frá. Talan var um ein hval upp á sjey skinn. Nógvar hendur vóru at hjálpa til at skera upp og hann varð skiftur til bygdina. Sostatt fingu sandvíkingar eitt kók í part og tað mundi koma væl við, tí nú er so langt síðani, att eir fingu grind seinast, at nú hava tey allarflestu verið púra sør rættiliga leingi*



# Nú er kjallarin komin

Jústinus Leivsson Eidesgaard

Skótahúsini niðast í Viðarlundini hava staðið eitt sindur við síðuna av sær sjálvum seinastu mánarnar. Ofta verður byrjað at gera kjallaran til eini hús, og síðan kemur miðhæddin, men so hevur ikki verið við skótahúsunum. Her byrjaðu teir í erva fyri nógvum árum síðani og undir var bara ein krúpikjallari. Nú eru húsin i víðkað og ein heil hædd er stoypt undir tey. Meðan hetta arbeiði er farin fram, eru húsini tikin av grundini og sett við síðuna av. Týsdagin vóru tey eftir skinnarum flutt oman á nýggju kjallarahæddina. Tey vóru drigin aftur á pláss við vanligum patenttaljum.

Nú hava skótarnir munandi betri umstøður at telgja, knýta knútar, leika og hugna sær og sjálvsagt eisini er betri pláss til álvarsmál.



# Ein timburhandil letur aftur

Jústinus Leivsson Eidesgaard

Teir rigga av í Timburhandlinum á Langasandi í Kollafirði. Og seinastu dagarnar hevur rættuliga útsøla verið í Kollafirði. Maður er farin av húsi fyri at ogna sær tilfar, tí føroyingar eru kendir fyri sjálvir eisini at duga at halda á einum hamara.

Tað er enn ikki eydnast okkum at fingið at vita hví timburhandilin á Langasandi, sum hevur lívgað norðstreymoyingar seinastu mongu árini við øllum frá timbri til høsnarhegn, letur aftur nú mitt í einum hákonjukturskeiði í Føroyum. Stjórin Christian Christiansen hevur ikki verið at hitta.

Men útsølan hevur gingið væl og fólk úr øllum meginøkinum hevur verið á Langasandi og keypt tilfar.

Í norðstreymi er eisini ein timburhandil í Vestmanna. Myndamaður okkara var á Langasandi í góðveðrinum og tók myndir.





# Fleiri bøtur til Watson

Paul Franklin Watson, sum í løtuni liggur í altjóða sjógvi tríggjar fjórðingar eystur úr Nólsoynni, hevur út at gera at taka í móti sektaruppskotum frá fútanum M. Nepper Christensen.

Týskvøldið um sjey tíðina fór løgreglan umborð á „Ocean Warrior“ og góvu honum eina bót upp á 200.000 krónur fyri at hava brotið útlendingalógina.

Bótin er givin, tí Paul Franklin Watson hevur í tveimum førum brotið føroyska lóg við at sigla inn um føroyskt mark. Hetta hendi 24. juli fyrrapart og eisini náttina millum 24-25 juli.

Paul Watson noktar seg sekan.

**je**

# Føroyingar eins fanatiskir

Sjónvarp Føroya hevði týskvøldið samrøðu við tvey hálendsk tíðindafólk, sum hava verið við Paul Watson umborð á „Ocean Warrior“ Tey lýstu Watson sum ein fanatikara, men løgdu ikki fingrarnar í millum fyri at skýra føroyingar fyri at vera tað sama. Tey vóru komin í land av „Ocean Warrior“ fyri lýsa grindadrápið frá føroyskari síðu og føroyingar, sum tey higartil høvdu tosað við, vóru eins fanatisk viðhaldsfólk at halda fram at drepa grind, sum Watson og felagsskapur hansara Sea Shepherd var í móti.

Tíðindafólkini eftirlýstu, at partarnir fóru at tosa saman og at føroyingar fóru at umhugsa, um tað var rætt at drepa grind í 21. øld.

Eitt sjónvarpslið hjá BBC hevur eisini verið í Føroyum fyri at lýsa grindadrápið sætt við føroyskum brillum.

**je**

# Náttúru-prógv í dag

Klokkan 15.00 í dag verða prógv handað til tey, sum hava gingið á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum og hava staðið royndina Bachelor of Science. Bachelor of art, science o.s.v. er ein persónur, sum hevur lokið prógv frá lærdum háskúla eftir trimum árum. Arne Nørrevang, rektari fer at handa teimum prógvini. Tey hava nú at enda gjørt eina høvuðsuppgávu, og evnini eru tikin úr føroysku náttúruni.

**je**


